# Jens Marni roynir seg í Popstars



**Jens Marni Hansen verður ein av teimum, sum fer at bjóða seg fram í nýggju Popstars kappingini hjá TV2**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Danska sjónvarpsrásin TV2 fer nú undir upptøkurnar til nýggja Popstars-sendirøð, og hesaferð verður ein føroyingur í tí stóru rúgvuni av fólki, sum fara at bjóða seg fram.

Tað er sangarin og gittarspælarin Jens Marni Hansen, sum millum annað er kendur frá síni tíð í bólkinum All That Rain.

Kollfirðingurin fer sunnukvøldið til Danmarkar, og mánadagin verður hann við til upptøkuroyndina í Keypmannahavn.

– Eg fari at royna meg, men tað er ein hørð kapping, tí tað verður roknað við, at eini 2000 fólk bjóða seg fram, og hesaferð er tað bara ein sangari, sum skal brúkast, sigur Jens Marni Hansen.

## Nýggj kapping

Nýggja Popstars sendirøðini verður eitt sindur øðrvísi enn tann seinasta. Tá varð ein gentubólkur settur saman, men hesaferð skal ein solistur finnast, og bæði kvinnur og menn kunnu bjóða seg fram.

Upptøkuroyndir verða í Keypmannahavn og í Århus, og hundraðtals sangarar fara at streyma til hesar royndir.

– Kjansurin fyri at verða tann seinasti, sum verður valdur burturúr, er evarska lítil, men eg vóni, at eg onkursvegna kann gera vart við meg, sigur Jens Marni Hansen.

## TV2 tekur upp

Danska TV2 hevur longu fingið eygað á føroyska sangaran, tí sjónvarpsstøðin fer at fylgja honum til upptøkuroyndirnar.

Júst sum seinast velja framleiðararnir nøkur áhugaverd fólk burturúr, sum teir fylgja í royndini at koma víðari, og Jens Marni er ein av hesum. Hetta er tó als eingin trygd fyri, at Jens Marni kann koma langt í kappingini, tí ymiskt er, hvussu tað gongur hjá hesum fólkum.

– Eg skal gera upptøkur, tá eg fari úr Føroyum sunnudagin, og mánamorgunin skulu vit taka upp í Kastrup. Hetta verður vónandi ein møguleiki hjá mær at gera vart við meg, hóast eg ikki komi longur í kappingini, sigur Jens Marni.

Dómararnir til upptøkuroyndirnar eru Simon Juncker, Tonia og Søren Sko.

# Stór kommunu-samanlegging á veg

**Tankar eru frammi um eina stóra kommunusamanlegging, sum fer at røkka frá Hósvík til Gjáar. Gjáar Kommuna hevur boðað frá, at hon er sinnað at fara undir samráðingar**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Edvard Joensen*



*Gjár Kommuna hevur boðað frá, at hon er sinnað at fara í samráðingar um eina stóra felagskommunu í Norðurstreymoy og Norðureysturoy*

Ætlanir eru frammi um eina stóra kommunusamanlegging í Norðurstreymoy og Norðureysturoy.

Kommunufelagsskapurin í Sundalagfnum, sum umfatar tær seks kommunrnar í Hósvík, Hvalvík, Saksun, Haldarsvík, Sunda- og Gjáar Kommunur viðgjørdi á fundi herfyri møguleikan fyri eini samanlegging. Avgjørt varð á fundinum, at hvør kommunan sær skuldi gera av innanhýsis, um farast skal undir fyrireikingar til eina stórkommunu. Hetta skuldi støða takast til á regluligum bygdarráðsfundum í teimum einstøku kommununum.

Sosialurin hevur frætt, at Gjáar Kommuna á bygdarráðsfundi hóskvøldið viðgjørdi málið, og tekur undir við ætlanini.

Sofus Johannesen, borgarstjóri við Gjógv, váttar fyri Sosialinum, at Gjáar Kommuna hevur boðað frá, at hon vil vera við í ætlanini.

Tá greitt er, um hinar kommunurnar hava somu støðu, verða samráðingarfólk vald, og farið verður undir realitetssamráðingar um samanlegging, sigur Sofus Johannesen.

Tríggjar aðrar kommunur eru í Norðureysturoy, sum tó ikki eru við í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum. Tær eru Elduvíkar Kommuna, Funnings Kommuna og Eiðis Kommuna.

Sofus Johannesen sigur, at væntandi fara hesar tríggjar kommunurnar eisini at fáa tilboð um at koma við í samstarvið.

Sosialurin skrivaði fyrr í vikuni, at samband hevur verið millum Hvalvíkar Kommunu og Saksunar Kommunu um samanlegging. Men sum skilst, verða hesar ætlanirnar óneyðugar, um nýggja, stóra samanleggingin gerst veruleiki, tí bæði Saksun og Hvalvík eru víð í teirri ætlanini.

# Føroyavinur umsetti Jens Paula til týskt

**Tá Otmar Werner, sáli, umsetti skaldsøgu eftir Jens Paula Heinesen til týskt, var tað einki minni enn søguskriving. Tað er nevniliga fyrstu ferð, at føroyskur skaldskapur er umsettur beinleiðis úr føroyskum til týskt. Týskst-føroyskt vinafelag Tjaldur hevur nú givið bókina út á týskum**

BÓKMENTIR
*Dagfinn Olsen*



*– Kjansurin fyri at verða tann seinasti, sum verður valdur burturúr, er evarska lítil, men eg vóni, at eg onkursvegna kann gera vart við meg, sigur Jens Marni Hansen*

Í hesum døgum vitja tey bæði Norbert og Reinhild Vogt í Føroyum. Tey umboða týskt-føroyska vinafelagið Tjaldur. Felagið hevur júst verið við til at geva út bókina "Nú ert tú mansbarn á foldum" eftir Jens Paula Heinesen í týskari týðing.

Reinhild hevur teknað forsíðuna á bókini, sum á týskum nevnist "Ein kind hier auf erden".

## Føroyavinur

Jens Pauli Heinesen sigur, at Otmar Werner, sáli, var føroyavinur, sum fáur. Hann var professari í norðurlendskum málum og dugdi væl føroyskt.

Vinalag var millum húskið Heinesen og Werner. Tey vitjaðu hvør hjá øðrum.

- Tey vitjaðu her og vit hjá teimum. Hann setti sær fyri at týða fyrsta part av søguni "Á ferð inn í eina óendaliga søgu", ið er fyrsti partur av sjey bókum. Hann starvaðist við lærda háskúlan í Freiburg í Suðurtýsklandi. Hann lærdi seg føroyskt. Eg vísti einaferð á, at vit her hava lærdan háskúla við nøkrum næmingum. Har hann starvaðist gingu eini 30.000 lesandi, sigur Jens Pauli Heinesen, og leggur afturat, at tá gjørdist hann bilsin.

- Otmar var ein av fremstu føroyavinunum. Hann datt oman fyri nøkrum árum síðani. Har Suðuri í Týsklandi eru høg fjøll og honum dámdi væl at ganga úti í náttúruni, sigur Jens Pauli Heinesen.

- Hann var sonevndur perfektionistur, sigur Jens Pauli, sum sostatt ikki ivast í, at týðingin er góð, hóast hann ikki sjálvur er so stinnur í týskum.

## Týddur til fleiri mál

Hóast føroyskar bøkur áður eru týddar til týskt mál, so er henda hending greið ábending til søgubøkurnar. Hetta er nevniliga fyrstu ferð, at týtt er beinleiåis úr føroyskum til týskt, tá um føroyskan skaldskap ræður.

Áður eru føroyskir høvundar týddir til týskt, t.d. Heðin Brú, men tá er týtt út donskum.

Jens Pauli Heinesen er eisini týddur til fleiri mál, svenskt, norskt, danskt, íslendskt og grønlendskt. Men her hevur talan verið um stuttsøgur.

Nú er ein skaldsøga eftir Jens Paula Heinesen týdd til annað mál, týskt, og tað fegnast hann um.

Útgevari av "Nú ert tú mansbarn á foldum" á týskum " Ein kind hier auf erden", er Ulrich Meysenbuurg og týskt-føroyska vinafelagið Tjaldur hevur fingið útgávuna í lag.

ítróttur

Nr. 97 • leygardagur • 25. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# FSF hevur ikki tikið støðu



*Dánjal Andreasen sigur undan fráferðina, at FSF enn ikki hevur gjørt av, hvussu teirra atkvøða skal fella á formansvalinum hjá FIFA*

**Fyri fyrstu ferð skal Dánjal Andreasen vera høvuðsumboðið hjá FSF, tá aðalfundurin hjá altjóða fótbóltssamgonguni, FIFA, verður hildin í komandi viku. Stóra hendingin á fundinum verður uttan formansvalið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Við í flogfarinum hjá Atlantsflog leygardagin verða tríggir av føroysku fótbóltstoppunum.

Formaðurin, Dánjal Andreasen, aðalskrivarin, Ísak Mikladal og formaðurin í landsliðsnevndini, Jens Erik Magnussen, verða nevnliga føroysku umboðini, tá aðalfundurin hjá FIFA verður hildin í Seoul týs- og mikudagin í komandi viku.

Hjá nýggja formanninum í FSF er talan sjálvandi um eina spennandi uppgávu, og tá vit hittu hann á máli undan fráferðini var tað heldur ikki frítt, at hann gleddi seg til uppgávuna.

- Hetta er fyrstu ferð eg fari á fund hjá FIFA, so tað er sjálvandi nakað, sum eg gleði meg til. Áður havi eg verið við á fundum hjá UEFA, og hesin verður væntandi á sama hátt, men tá talan er um FIFA, eru luttararnir sjálvandi fleiri í tali, so tað er avgjørt nakað, sum eg gleði meg til, sigur Dánjal Andreasen.

## Formansvalið

Tað eru sjálvandi fleiri mál á skránni til aðalfundin, men tað, sum hevur fingið so nógv tað dyggastu umrøðuna í fjølmiðlunum, er formansvalið, sum stendur fyri framman.

Spenningurin var stórur, tá verandi formaðurin, Sepp Blatter, varð valdur fyri tveimum árum síðani, og beint sum tepri sigurin á svianum, Lennart Johansen, var veruleiki, fóru ákærurnar um korruptión at fúka.

Síðani hevur Blatter í nógvar mátar verið í andgletti, og ikki minst tykist hetta at vera galdandi, nú ein av hægstu embætismonnum hansara alment hevur boðað frá, at forsetin hevur fingið FIFA í fíggjarligt óføri.

Tað hevur tí vakt ans, at føroyski fótbóltsbossurin enn ikki hevur tikið støðu til, hvussu føroyska atkvøðan fer at fella á fundinum, men sjálvur hevur Dánjal eina rættiliga einfalda frágreiðing til hetta.

- Tað kemst fyrst og fremst av, at vit ikki vilja døma nakran upp á forhond. Rapportina, sum fleiri miðlar sigast hava fingið hendur á, hava vit so ikki sæð enn, so vit fáa á ongan hátt gjørt nakra einvísa niðurstøðu í málinum, og so vita vit heldur ikki so nógv um, hvat mótvalevnið hjá Blatter stendur fyri.

- Alt hetta eru lutir, sum vit vilja hoyra framløgu av, áðrenn vit taka nakra støðu í formansvalinum, sigur Dánjal.

Og at Føroyar helst ikki eru einasta landið, sum ivast, bendir alt eisini á. Vanliga er annars soleiðis, at øll lodnini í eitt nú UEFA atkvøða fyri sama valevninum, men soleiðis verður neyvan hesaferð. Danmark hevur mest sum boðað frá, at teir atkvøða blankt. Týskland, Frakland og Sveis fara ivaleyst at atkvøða fyri Blatter, meðan fleiri onnur lond ikki vilja stuðla umstrídda forsetanum, so enn tykist alt vera púrasta opið.

Undan sjálvum aðalfundinum hjá FIFA, sum altso verður týsdagin, fara UEFA londini at savnast mánadagin, og møguliga fæst ein betri ábending um, hvussu atkvøðurnar fella, eftir henda fundin.

Skála-VB:

# Stevnudystur á Skála

**Vágbingar tykjast munandi skerdir, tá teir í dag, leygardagin, fara at spæla stevnudyst móti Skála, sum hinvegin tykist fullmannað undan dystinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Fyri fyrstu ferð skal Skála spæla stevnudyst í bestu mansdeildini í fótbólti, og sum vera man, so er spenningurin stórur í bygdini, sum einamest er kend fyri hondbóltsavrik síni, men sum nú eisini ger seg galdandi í fremstu fótbóltsrøðini.

## Mugu ikki dragna

Og hóast teir tríggir fyrstu dystirnir bert hava kastað eitt stig av sær, so er hugurin at spæla bólt í bestu deildini framvegis stórur á Skála.

- Sjálvandi skulu vit helst fáa nøkur stig nakað skjótt, men enn hava vit so ikki havt neyðuga hepnið, so vónandi verður tað hesaferð, sigur Alexandur Johansen, sum higartil hevur verið fastur fúsur á liðnum hjá Skála.

Og vónirnar til dystin hesa ferð tykjast eisini vera heilt góðar. Arnold Berg hevur onkran snudd í knænum, og Jonhard Frederiksberg hevur framvegis nakað av trupulleikum við rygginum, men væntandi vera teir báðir klárir, tá dysturin sum hin einasti av teimum fimm hetta umfarið verður blástur í gongd leygardagin.

## Nógvir skaðar

Heilt so væl stendur ikki til hjá VB, har tað av álvara tykist at tynnast í hópinum.

- Tá vit hóskvøldið frættu úr Vági, tóktist tað sera ivasamt við fleri av teimum, sum vanliga teljast millum teir fyrstu ellivu.

Marek Wierzbicki hevur framvegis trupulleikar av at renna, og enn røkist einki fyri, at hann verður tøkur aftur. Hartil verðu mett, at tað er sera ivasamt, hvussu verður við Eyðuni Jacobsen, Jón Paula Olsen og Predrag Zivkovic, umframt at Mortan í Hørg hevur leikbann eftir reyða kortið, sum hann fekk seinast, so tað er skilligt, um vágbingar ganga í djúpum tonkum, nú seinastu fyrireikingarnar skulu fáast frá hondini.

Skulu teir vera við í oddinum, so sum teir ætla, so eru treytirnar tó greiðar. Tað eru neyvan ráð at tveita trý stig afturat burtur móti einum uppflytara, men tær treytirnar kenna vágbingarnir sjálvandi.